# Fyrsti ídnaðarbygningurin reistur í Sørvági

Mikudagin flaggaði fyri fyrsta bygninginum á nýggja ídnaðarøkinum í Sørvági. Talan er um bygningin sum gólváleggingarfelagið JIMS letur byggja. Bygningurin er 15 x 20 metrar og er í tveimum hæddum, skrivar heimasíðan hjá Jóanis Nielsen. Tað er byggifelagið Trøðhamar í Miðvági, sum stendur fyri arbeiðinum av nýggju høllini í Sørvági, meðan Sandavágs Timburhandil letur byggitilfarið og stálkonstruktiónirnar. Ætlandi verður bygningurin klárur at taka í brúk um hálvan novembur.



# Í fótasporum S.J. Mykines

Millum tey mongu áhugaverdu tiltøkini á Útoyggjastevnuni í Mykinesi verða tveir gongutúrar – annar ein forminnatúrur í bygdini við Símin Arge sum ferðaleiðara, og ein har listamálarin Kári Svensson fer at greiða frá. Ikki óvæntað verður hesin túrurin um kenda málarin, S. J. Mykines. Sum skilst verður steðgað á við ymisk støð, haðani hesin kendi málarin fann sær myndevni úr oynni.

# best



*Esbern í Eyðansstovu (í miðjuni) hjálpir ferðafólkunum í land í Mykinesi*

## Greinarøð úr Mykinesi

Leygardagin 28. juni verður Útoyggjastevna hildin í Mykinesi. Í hesum sambandi hevur Sosialurin vitjað í bygdini, her lýsa ymisk viðurskifti í stevnubygdini. Aðrar greinir úr Mykinesi hava verið í blaðnum 13. juni (um minnisvarðan) og 16. juni (um oljutunnur).



*- Vit hava flutt fleiri ferðafólk í ár enn í fjør, sigur Albert Johansen, skipari á Brynhild*



*- Vit hava longu fingið sera góðan stuðul, sigur aðalskrivarin í Bláa Krossi, Hjalmar Hansen. Hann er her avmyndaður á planeraða grundøkinum, sum Nes kommuna hevur latið felagsskapinum*

# Blákrossheimið flytur inn á Nes

**Bláikrossur hevur í eina tíð arbeitt við at fáa bygt eitt nýtt viðgerðarheim, ístaðin fyri tað sum liggur í Havn. Nú er eitt byggibúgvið grundøkið fingið til vega frá Nes kommunu, samstundis sum fleiri kommunur hava avgjørt at stuðla byggingini**

FELAGSSKAPUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Nes:** - Vit fegnast um stuðulin, sum vit hava fingið frá bæði smærri og størri kommunum, sigur Hjalmar Hansen, aðalskrivari í Bláa Krossi.

Samstundis sum hesin fráhaldsfelagsskapurin hevur arbeitt við tekningunum til nýggja viðgerðarheimið ovarlaga á Nesi, hevur verið arbeitt við fíggingini.

Hetta hevur millum annað verið gjørt við eini áheitan á allar kommunurnar í landinum um at veita stuðul til byggingina, sum væntandi fer at liggja um einar 10 mió krónur.

Umboð fyri Bláa Kross hava haraftrat havt fundir við tær flestu av teimum størru kommunum, har ætlanin er løgd fram.

- Móttøkan, sum vit hava fingið hevur verið sera góð, sigur Hjalmar Hansen.

Blái Krossur hevur higartil fingið játtan um stuðul frá seks kommunum. Men ikki er óvist, at enn fleiri fara at veita teimum stuðul.

Hesar seks kommunurnar eru: Skúvoy, Funningur, Leirvík, Sjóvar, Runavík og Porkeri.

Haraftrat hevur Nes kommuna latið felagsskapinum eitt omanfyri 2000 fermetrar stórt grundøki til ætlanina. Ein gáva sum helst er verd upp ímóti 1 mió krónum.

- Hetta eru vit, sum vera man sera takksom fyri, sigur aðalskrivarin í Bláa Krossi, Hjalmar Hansen.

Einki verður kortini sagt um, nær nýggja Blákrossheimið kann standa liðugt.

**Í serstaka Eystanstevnublaðnum komandi mikudag, hyggja vit nærri eftir hesi ætlanini.**